# KT-starv í Kringvarpi Føroya

**Vit sóknast eftir einum royndum og dugnaligum mennara til KT-deildina. KT-deildin tekur sær av rakstri, viðlíkahaldi og menning av KT-økinum í Kringvarpinum.**

**STARVIÐ**

Títt fokusøki verður í høvuðsheitum at forrita á web-pallum. Uppgávurnar fevna eitt nú um:

- At menna heimasíðuna hjá KVF
- At menna og umsita innanhýsis skipanir
- At menna skipanir í sambandi við, at søvnini í KVF verða talgildað
- At verða við í arbeiðinum at íverkseta nýggja og menna verandi tøkni

**TÍNIR FØRLEIKAR**

- Tú hevur viðkomandi útbúgving og/ella drúgvar royndir innan forritan
- Tú hevur hollar royndir innan Microsoft og Linux
- Tú kennir væl hugtøk so sum PHP, C# og Jquery

**TÍNIR EGINLEIKAR**

- Fyrst og fremst ert tú eldhugað/ur fyri KT
- Tú hevur áræði at seta teg inn í nýggja tøkni
- Tú ert røkin, fryntlig/ur og hevur góð samstarvsevni
- Tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, men eisini í toymi

**VIT BJÓÐA**

- Eitt spennandi arbeiði við skiftandi uppgávum
- Eitt starv við møguleikum at menna seg innan miðlatøkni
- At tú ert partur í einum góðum fakligum toymi, har tú lærir nógv nýtt

**SETANARTREYTIR**

Starvið verður sett sum skjótast ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið. Umsóknarfreistin er 01. desember, og umsóknir skulu sendast til umsokn@kvf.fo

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kára Poulsen, tøknileiðara, á telefon 296676 ella teldupost: kpo@kvf.fo.

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Kringvarpsstjórin stjórnar stovninum við tilvísing til stýrið, ið telur sjey limir. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting. Umleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.